Fyri 30 árum síðan:

# »Star Firth« fekk brotasjógv



»Star Firth« fekk ein brotasjógv og sakk við bryggjuna í Lopra



Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1977

5. januar 1977 fekk farmaskipið "Star Firth", við heimstaði í Fuglafirði, ein brotasjógv, sum kroysti lúnningina inn í stýriborð. Skipið var tá á veg úr Íslandi til Noregs við eldgosøsku og var statt miðskeiðis millum Føroyar og Hetland, tá óhappið hendi.

Skaðin var somikið álvarsligur, at skipið fór at leka, og neyðarkall varð sent út beinanvegin. Støðan gjørdist so hættislig, at manningin mátti ríma av skipinum.

Verjuskipið Fylla, sum var komið til hjálpar, tók manningina upp og fór til lands við henni. Tjaldrið, sum eisini kom til hjálpar, fekk ein enda umborð á Star Firth og sleipaði skipið inn á Lopra. Tá var so nógvur sjógvur komin í skipið, at tað sakk við bryggjuna.

Eftir at froskmenn høvdu tett lekan, sum skipið hevði fingið framman, varð sjógvurin pumpaður úr lastini. Skipið varð síðan tikið upp á sleipistøð og skaðin umvældur.

"BigBrother"

# Bilurin funnin eftir tíggju minuttum



Á nýggjárinum varð ein sethúsaeigari í Keypmannahavn, sum var í Norra og ferðaðist, uppringdur av einum granna, sum hevði lagt til merkis at ein hurð stóð opin í heimi hansara.

Maðurinkontaktaðibeinanvegin løglegluna, sum kom á staðið og kundu staðfesta at tað ikki einans var talan um innbrot, men tjóvarnir eisini høvdu stolið bilin, ein Range Rover til virði av 800.000 krónum.

Tá eigarin greiddi løgregluni frá, at bilurin hevði navigatiónsskipan við innbygdari leitiskipan, vendi løgreglan sær til "ETS Vagtcentralen", sum beinanvegin settu eina leiting í verk.

Tíggju minuttir seinni varð bilurin funnin. "ETS Vagtcentralen" kundu siga akkurát hvar bilurin var staddur í miðbýnum í Keypmannahavn. Løtu seinni kom løgreglan á staðið og funnu bilin fullum av tjóvagóðsi og handtóku tjóvarnar, sigur Hardy Vad frá "ETS Distribution Scandinavia A/S", sum standa aftanfyri hesar "BigBrother" leitiskipanirnar.